# Nýggjur festivalur í gomlum umhvørvi





Fyrireikararnir skoða økið, har jóansøkufestivalurin skal haldast. Undir hugnaligu og gomlu pakkhúsunum hjá Thomsen fara tónarnir at sveima, og mitt í øllum hesum er Pubbin, ið einaferð var kongaligur handil, men sum í dag stendur óbroytt og sær út, júst sum fyri meira enn 100 árum síðani
Mynd: Bjarni Nygaard

**Jóansøkufestivalurin er millum nýggjastu festivalarnar. Í ár verður hann hildin millum elstu handilsbygningar í landinum, so hugnin verður settur í hásæti saman við góðum tónum frá føroyingum og útlendingum**

FESTIVALUR
aki@sosialurin.fo

Trý ár hevur Jóansøkufestivalurin á baki og telist sostatt millum yngstu festivalarnar í Føroyum, hóast ongin teirra kann kallast gamal.

Men umhvørvið hesaferð verður serstakt. Jóansøkufestivalurin verður hesaferð hildin á bryggjuni á Tvøroyri. Undir hugnaligu og gomlu pakkhúsunum hjá Thomsen fara tónarnir at sveima og mitt í øllum hesum er Pubbin, ið einaferð var kongaligur handil, men sum í dag stendur óbroytt og sær út, júst sum fyri meira enn 100 árum síðani. Men tó er Pubbin náttúrligur partur av gerandismyndini á Tvøroyri og á jóansøku av jóansøkufestivalinum.

Eitt er, at gamli handilin, pakkhúsini og fiskaplássið skapa hugna, men eisini fer Norðlýsið at liggja við bryggjuna, meðan festivalurin er, og Birgir Enni, skipari, kokkur og tvøramaður, fer at borðreiða við frálíku fiskasuppuni, ið er heimskend.

## Góð skrá

Skráin verður eisini sterk í ár. John Lawton, frontmaðurin í legandariska bólkinum Uriah Heep árini 1976 til '79, kemur at syngja løg frá hesi tíðini. Hann hevur enn gongd í síni yrkisleið sum sangari og samstarvar m.a. við Ken Hensley frá Uriah Heep, og sum vitjaði fyrsta Summarfestivalin fyri eini 5 árum síðani.

Orkestrið Deiggj, ið á sinni byrjaði á Tvøroyri, og sum enn er virkið, hóast tað mest er norðanfjørðs, fer at spæla undir hjá Lawton. Manningin er von við sjeytiárarock og hevur eisini vant nógv til framførsluna á jóansøku.

Umframt Lawton, fer Teitur at hava útgávukonsert á festivalinum og løg av nýggju fløguni, Káta Hornið, vera at hoyra. Onnur nøvn eru t.d. Crawling Blue, Brandur Enni, Side Effect, Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen.

Frásøgumnaður verður Jákup Magnussen.

Fyrireikararnir siga seg vænta sær góðan festival og hava góðar vónir, nú teir halda eg hava funnið røttu umstøðurnar millum gomlu og søguligu húsini á bryggjuni á Tvøroyri, har livandi søga og gerandisdagur vanliga ganga hond í hond, og har livandi tónleikur leygarkvøldið kemur at seta dagsskránna.